# Samfelagsbólkar og val av flokki

**Fólkaflokkurin mist stuðulin millum almennar løntakarar. Sambandsflokkurin arbeiðaraflokkur? Borgarligu flokkarnir frægari fyri millum sjálvtstøðugt vinnurekandi. Pensiónistarnir býta seg javnt millum fýra teir stóru. Hetta eru nakrar av yvirskriftunum í veljarakanningini, sum Fynd hevur gjørt saman við Sosialinum. Fynd fevnir um eitt netverk av samfelagsfrøðingum á miðnámsskúlum og Fróðskaparsetrinum**



*Jógvan Mørkøre, samfelagsfrøðingur, leggur fram veljarakanningina fyri um boð fyri politisku flokkarnar í Miðlahúsinum í morgun: Kári P. Højgaard, Sjálvstýrisflokkurin, Óli Breckmann, Fólkaflokkurin, Kaj Leo Johannesen, Sambandsflokkurin, Bill Justinussen, Miðflokkurin, Tórbjørn Jacobsen, Tjóðveldisflokkurin og Jóannes Eidesgaard, Javnaðarflokkurin*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

VELJARAKANNING
*Jógvan Mørkøre*

Veljarakanningar kunnu, eru tær nóg umfatandi og lagt er eftir tí, geva eina mynd av, hvar ið ymsu flokkarnir standa sterkastir, tá tað ræður um stuðul frá ymsum samfelagsbólkum. Serligur áhugi er fyri tí, ið kann nevnast klassaval ella á enskum 'class voting'. Serliga hevur granskingin heft seg við, at t.d. teir stóru sosialdemokratisku flokkarnir í Evropa hava mist traditionella takið á vanliga arbeiðaranum, men afturfyri styrkt sína støðu millum vaksandi talið á alment løntum. Samstundis síggja vit í tí mesta av Evropa, at tað, vit vanliga fata sum borgarligir flokkar, styrkja sína støðu bæði millum arbeiðarar og alment lønt og gerast minni heftir at háinntøkubólkum og bóndum. Yvirhøvur er eitt rák burtur frá klassavali – ivaleyst eitt úrslit av, at flestu flokkar í dag meira miða seg eftir at boða politikk og draga atkvøðufiskar inn í bæði borð, heldur enn at umboða serligar samfelagsbólkar.

Spurningurin er so, um vit kunnu staðfesta eitt líknandi rák frá klassavali til til eitt meira tilvildarligt og spjatt býti av atkvøðunum frá ymsum samfelagsbólkum upp á flokkarnar.

Til ber beinleiðis at samanbera úrslit frá umfatandi veljarakanningum frá 1990, 1994, 1997, 2002 og 2006, ið Fynd hevur gjørt. Samanberandi talva er gjørd burturúr hesum við denti á fýra stóru flokk-arnar Fólkaflokkin, Sambandsflokkin, Javnaðarflokkin og Tjóðveldisflokkin. Aðrir smáir flokkar – sum hava verið skiftandi í tali – eru samanfataðir undir einum, 'Aðrir flokkar'. Ein orsøk er, at tølini ofta eru so smá upp á einstaka flokkin og óvissan hareftir, so tað verður nærum meiningsleyst at bera tey víðari einsæris. Onnur orsøk er tær sundurstøkkingar í tí politiska umhvørvinum, ið vil hava serstakar kristiligar flokkar. (Júst í tíðarskeiðnum, sum myndirnar fevna um, eru byltingar í hesum umhvørvinum, sum føra til, at Miðflokkurin loksins stendur einsamallur eftir.) Skeiðið 1990-2006 er sjálvandi avmarkað tíðarskeið, men úrslit eru frá øðrum kanningum longur aftur í tíð, har tað ber til at samanbera summi av úrslitunum frá 1990 og frameftir beinleiðis við eldri tøl, í øðrum førum við einum fyrivarni, tí bólkarnir eru ikki eins samansettir. Serliga áhugaverd er her kanningin frá 1978, sum Observa gjørdi fyri Dimmalætting upp undir løgtingsvalið sama árið.

## Fólkaflokkurin mist almennar løntakarar

Tá ið tað ræður um løntakarabólkarnar undir einum, so eru teir fýra stóru flokkarnir rættuliga javnir, tó so at Fólkaflokkurin hevur hug at standa eitt sindur veikari enn hinir. Tað er serliga tey alment løntu, ið heldur taka aðrar flokkar framum. Her fær Fólkaflokkurin 18% í seinastu kanningini frá 2006, meðan hinir tríggir liggja úr 21 og upp í 30%. Tað er einki nýtt í hesum. Síðani tey ringu kreppuárini í fyrru helvt av 90-árunum hevur hann staðið seg illa í hesum bólkinum. Men onkuntíð hevur staðið frægari til: Í 1984 atkvøddi 3. hvør í almennum starvi fyri Fólkaflokkinum. Javnaðarflokkurin tóktist at hava fótað sær aftur her, men seinastu tølini draga niður. Tekur tú løntakarabólkin undir einum, so fór kreppan illa við Javnaðarflokkinum. Hann misti undirtøku bæði millum alment sett og privat sett. Millum privat sett reyk undirtøkan úr 33% í november 1990 niður í 14% í juni 1994; síðani hevur undirtøkan kvinkað seg upp í 21%. Her liggja Tjóðveldisflokkurin og Sambandsflokkurin kortini væl frammanfyri við tølum úr 27 upp í 30%. Millum almennu løntakararnar var farið at bragda aftur. Her var Javnaðarflokkurin farin úr 18%´um í eini kanning




